## Morten Olsen funnið avloysara

Danski landsliðsvenjarin í fótbólti, Morten Olsen, heldur, at Michael Laudrup skal verða næsti landsliðsvenjarin í Danmark. Morten Olsen hevur sáttmála við danska fótbóltssambandið fram til 2010, og tá ætlar hann sær at gevast í starvinum. - Vit hava somu grundleggjadni hugsan um fótbólt, og Michael kundi hildið fram við tí arbeiðnum, sum eg havi gjørt higartil, sigur Morten Olsen við blaðið BT.



## Pól skal ansa pengunum

Fyrrverandi landsliðsspælarin í fótbólti Pól Thorsteinsson er farin aftur til barndómsfelagið í Vági at spæla fótbólt. Pól hevur eisini fingið starv í Vágs kommunu, har hann verður fíggjarleiðari, og í løtuni flytir Pól til Vágs. Á aðalfundi hjá VB/Sumba var Pól Thorsteinsson eisini valdur til nýggjan kassameistara í felagnum. Pól skal avloysa Helga Kristiansen, sum hevur sitið á kassanum í nøkur ár.

# Nógv spildur-nýtt í Gundadali



**Fuglfirðingar fara at royna at halda sær á aldukambinum, sum teir kendu seg vera á síðsta hálva tíman ímóti HB**

B36-ÍF
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialrin.fo*

Klokkan 17 leygardagin verður fyrsta bríkslið í Formuladeildini 2008. B36 er vertur, og ÍF er gestur í Gundadali.

Í B36 royna teir at flyta favorittheitið, sum teir hava havt nógvu tey seinastu árini, av sær. Lyklaspælarar frá í fjør eru burtur, og nú nýtt lið verður samanspælt verður sagt, at topp trý er málið hjá Heðini Askham og hansara monnum, ið eru so væl fyri, sum tað ber til at vera.

Í Fuglafirði skulu teir eina ferð enn stríðast fyri at fóta sær í bestu deildini. Abraham Løkin hevur ábyrgdina í morgin fyri besta liðnum í barndómsfelagnum ímóti B36, sum hann spældi við fyri tjúgu árum síðani.

Tað er líkt til, at hetta verður einasti landskappingardysturin hjá ÍF í hesum umfari við Abrahami Løkin sum róðursmanni. Davis Jones, hevur verið upp á tal sum ÍF venjari, síðani Jón Simonsen noyddist at gevast, kemur til Fugalfirðar í næstu viku, verður upplýst úr ÍF.

Í fyrsta umfari í steypakappingini eydnaðist B36 at vinna ímóti Skála. Alt var ikki so sannførandi, men í B36 eru teir bjartskygdir undan uppgávuni í morgin.

ÍF tapti 3-2 á heimavølli ímóti HB í fyrsta umfari í steypakappingini. Men fuglfirðingar eru ikki illa nøgdir. Serliga væl nøgdir eru teir við síðsta hálva tíman, tá ið teir vóru ágangandi og rættuliga settu trýst á HB.

Høgni Madsen og Fritleif í Lambanum hava verið smáskaddir í vikuni, men teir verða førir fyri at spæla í morgin.

# Útlendingar bíða eftir loyvunum



**Bæði í EB/Streymi og KÍ sita framrættaðir útlendingar uttanfyri, tí loyvini ikki eru komin upp á pláss**

EB/STREYMUR-KÍ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialrin.fo*

Tað er vorðið sum avbjóðing hjá klaksvíkingum í fyrsta umfari. Teir skulu royna seg á útivølli ímóti EB/Streymi, sum – burtursæð frá lagnudystinum í 2006! – plagar at hava gott tak á KÍ.

EB/Streymur er væl mannað. Allir teir, sum vóru við í steypasigrinum ímóti KÍ, eru tøkir hesa ferð. Harafturat er nýggi miðvallargeneralurin Mikkjal Thomassen tøkur aftur, eftir at hann hevur verið burturstaddur.

Einasti maður, sum ikki er tøkur, er 20 ára gamli ungverjin Marcell. Hann hevur roynst stak væl í venjingardystunum, men framrættaði spælarin fer aftur hesa ferð at teljast millum áskoðararnar. Orsøkin er tann, at uppihaldsloyvið er ikki komið upp á pláss enn.

Sama søgan er í Klaksvík. Brasilski Andersson fer eisini at teljast millum áskoðararnar. Framrættaði spælarin bíðar eftir uppihaldsloyvinum.

Stýrimaðurin í KÍ verjuni, Jan Andreasen, hevur verið uttanfyri við knæskaða í fleiri vikur. Hann verður ikki við sunnudagin, men í Klaksvík hava teir mót um, at hann skjótt verður tøkur aftur. Hóskvøldið fór Jan at renna aftur.

Á positivu síðuni hjá KÍ telur tað, at framrættaði Rodrigo úr Brasil, sum hevur verið vøddaskaddur, nú er tøkur aftur. Heðin á Lakjuni spældi bara átjan minuttir í steypadystinum ímóti Fram. Nú er hann sloppin av við vøddaskaðan og verður við í Streymnesi. Tað verður Sìmun Joensen eisini. Hann sat leikbann frá í fjør av sær, tá ið KÍ spældi steypadyst ímóti Fram.